# Bygdasøvnini í Føroyum í summar

Tvøroyrar bygda-og sjóvinnusavn.
**Gamla Doktarahúsið**
Frá 22. mai til 28. august er savnið opið hvønn sunnudag kl. 15 - 18.
Annars eftir avtalu á Kunningarstovuni á Tvøroyri, tlf. 372480 ella 254941.
Atgongugjald: 20,- kr.

Sands Bygdarsavn.
**Norðara Koyta**
Frá 5. juni til 28. august er savnið opið hvønn sunnudag kl. 16 - 18.
Annars eftir avtalu við Sandoyar Kunningarstovu, tlf. 361836 ella 222078.
Atgongugjald: 20,- kr.

Nólsoyar Bygdarsavn.
**Húsini við Brunn**
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 327020 ella 327003.
Atgongugjald: 20,- kr.

Sørvágs Bygdarsavn.
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 332893, 333284 ella 333191.
Atgongugjald: 30,- kr.

Miðvágs Bygdasavn.
**Kálvalíðhúsini**
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 332425 ella við at venda sær til Vága Kunningarstovu, tlf. 333455 ella 213455.
Atgongugjald: 1 - 10 fólk 30,- kr., 11 - 20 fólk 20,- kr., 21 ella fleiri fólk 15, - kr. fyri hvønn.

Eiðis bygdasavn.
**Látrarlonin**
Frá 1. juni til 31. juli er savnið opið mikudag og sunnudag kl. 14 - 16.
Annars eftir avtalu á tlf. 423496, 423597, 423269 ella 423031.
Atgongugjald: 30,- kr., børn ókeypis.

Bygdasavnið í Nes kommunu.
**Gamli Prestagarðurin og húsini í Køkinum**
Frá 5. juni til 30. august er savnið opið týsdag kl. 16 - 19 og sunnudag kl. 15 - 18.
Annars eftir avtalu á tlf. 447696, 449214/219214, 447438 ella 447251.
Atgongugjald: 30,- kr. Bólkar, min. 10, 20,- kr.
Børn undir 16 ár ókeypis.

Bygdasavnið Forni.
**Glyvrar**
Frá 11. juni til 15. september er savnið opið mánadag og mikudag kl. 16 - 19 og sunnudag kl. 16 - 18.
Annars eftir avtalu á tlf. 226088, 447391 ella 449214.
Atgongugjald: 30,- kr. Bólkar, min. 10, 20,- kr. fyri hvønn.

Gøtu Fornminnissavn.
**Blásastova við hoyggjhúsinum og Glyvra Hanusarhús**
Frá 16. mai til 1. september er savnið opið mánadag, týsdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag kl. 14 - 16.
Annars eftir avtalu á tlf. 222717 ella 228768.
Atgongugjald: Vaksin 30,- kr., børn 10,- kr.

Norðoya Fornminnasavn.
**Handilshúsini, Gamla Apotekið, Klaksvík**
Frá 16. mai til 15. september er savnið opið hvønn dag kl. 13 - 16.
Annars eftir avtalu á tlf. 456287 ella 456939.
Atgongugjald: 20,- kr. Bólkar, min. 10, 15,- kr. fyri hvønn.

# Løgfrøðingur til Kommunusamskipan Føroya

Kommunufelagið hjá stóru kommununum í Føroyum, KSF økir virksemið og sóknast tí eftir einum dugnaligum løgfrøðingi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- Fyrireika og ráðgeva limakommununum í málum av felags áhuga, t.d. viðgera hoyrings- og ætlannarskriv frá stjórnarráðunum, og mál av aðalreglu-ligum týdningi fyri kommunurnar annars.
- Gera løgfrøðiligar útgreiningar og frágreiðingar til limakommunurnar.
- Arbeiða við at styrkja og samskipa kommunuumsitingarnar í KSF, m.a. við at gera felags vegleiðingar og mannagongdir.
- Ráðgeva limakommununum í serstøkum málum
- Virka við í skeiðum og øðrum mennandi virksemi, sum KSF hevur fyri limakommununum.
- Umboða KSF í arbeiðsbólkum.
- Samskifta við landsumsitingina, áhugabólkar og aðrar samstarvsfelagar hjá limakommununum.
- Savna og umsita vitan um kommunurættarlig viðurskifti

**Førleikakrøv og avbjóðingar**
- Løgfrøðiligt embætisprógv.
- Umsitingarligar ella aðrar samsvarandi royndir
- Kunnleika til kommunurætt og fyrisitingarerætt, eins og ein breið tilgongd til onnur lógarøki er ein fyrimunur.
- KSF er ein politiskur felagsskapur, politiskt tev er tí ein treyt fyri at kunna røkja starvið nøktandi, eins og hugurin at fáast við og meta um kommunupolitiskar spurningar - tó við størstu virðing fyri fakligheitini.
- Viðkomandi má hava evnini at fordjúpa seg í serstøk evni, men eisini kunna "hava fleiri bóltar í luftini í senn".
- Viðkomandi má evna at lyfta serstakar spurningar upp og viðgera teir á generellum støði, so viðgerðin gagnar heildini.
- Viðkomandi má hava evnini at bera felags stevnumið og leiðreglur inn í kommunufyrisitingarnar.

**Seturnarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. september ella soleiðis sum hóskar til uppsagnarfreist í einum verandi starvi. Lønin verður avtalað eftir fakligum førleika og royndum, við støði í sáttmálanum hjá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Starvsstaður**
Skrivstovan liggur í Tórshavn. Roknast má við, at nakað av ferðing verður til limakommunurnar.

**Meira fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, aðalskrivara tlf. 322180 ella 213080. Starvsprofil og upplýsingar um KSF finnur tú á heimasíðuni www.ksf.fo

**Umsókn**
Umsókn skal saman við CV vera KSF í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. juni kl. 16.00 og sendast:

## Kommunusamskipan Føroya
Lucas Debesargøta 6-8
Postboks 53
FO-110 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin

# Sjúkrarøktarfrøðingur til E3/E2

Eitt fulltíðarstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á E3/E2 á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan frá 1. august 2005 ella eftir avtalu. Møguleiki eru fyri lægri brøkið.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hollar royndir og fakligan áhuga innan sjúkrarøktina

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

**Upplýsingar um størvini** eru at fáa við at ringja telefon 304500 til Mariann Nielsen, virkandi deildarleiðara, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 23. juni 2005 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábygd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum, CV, autorisatión, viðmælum e.l. skal sendast til:

## Landssjúkrahúsið
Lønar- og starvsfólkadeildin
att. Una Fagraberg
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

Lesið Sosialin - so eru tit við